# O´Neill vil ikki venja Ongland



Aston Villa venjarin, Martin O'Neill var ein av favorittunum til at yvirtaka venjarasætið hjá enska landsliðnum, eftir McLaren, men hann er ikki áhugaður í starvinum. Sambært enska tíðarritinum, The Times vil Martin O´Neill útiloka seg frá at vera settur í samband við venjarastarvið hjá enska landsliðnum. Hetta kemur í kjalavørinum av at tíðarritið hevur hoyrt at O´Neill í dag, fer at kunngera, at hann vil vera verandi í Birmingham felagnum, Aston Villa. Haðar hann kom frá skotska Celtic. O´Neill sigst ikki at vera fegin um at úttala seg um venjarastarv, ið hann ikki er boðin enn, men hann følir seg noyddan at koma við einum greiðum úttalilsi, áðrenn ov nógv hóvasták spyrst burturúr. Sama framferðarhátt nýtti "Big Sam" Sam Allardyce, venjarin hjá Newcastle, ið annars var í puljuni av áhugaðum avloysarum hjá Sven Gøran Eriksson, tá hesin var sekkjaður fyri umleið einum ári síðani. Tessvegna sær tað enn meira greitt út, til at tað verður ein útlendskur venjari, ið fer at taka við starvinum á rokmikla plássinum í Onglandi. José Mourinho er enn favorittur hjá veddingarfyritøkum.

# Helgi og Høgni favorittar

**FM finalurnar í talvi fyri børn og ung verða leygardagin í Argja Skúla. Kappingin er skipað í aldursbólkum og telvað verður um 5 FM-heiti: U10, U12, U14, U16, U20**



*Helgi Dam Ziska, ið saman við Høgna Egilstoft Nielsen er favorittur í ávíkavist bólki A (U-20) og bólki E (U-10)*

## FAKTA

**Manningarnar í ymsu bólkunum:**

**A-bólkur - U20 ár:**
1. IM Helgi Dam Ziska, Tórshavn
2. Rógvi Dragaberg, Klaksvík
3. Jón Gregersen, Sandavágur
4. Herborg Hansen, Klaksvík
5. Reidar Egilsnes Hansen, Vestmanna (opin tilmelding - ongin undankapping)
6. Bárður J. Stórá, Vestmanna
7. Theodor Larsen, Oyri

**B-bólkur - U16 ár:**
1. Rógvi Egilstoft Nielsen, Sandavágur
2. Hjalti Toftum Jógvansson, Tórshavn
3. Vagnur Dam, Oyri
4. Margar Berg, Tórshavn
5. Bogi Hansen Eliasen, Klaksvík
6. Jóhan R. Mortensen, Oyri
7. Borgar J. Stórá, Vestmanna

**C-bólkur - U14 ár:**
1. Heiðrikkur Tindsk. Jacobsen, Tórshavn
2. Pætur Poulsen, Skopun
3. Jóhann Vørmadal, Vestmanna
4. Rúni Vørmadal, Vestmanna
5. Jógvan Emil Joensen, Vestmanna

**D-bólkur - U12 ár:**
1. Johan Hentze, Oyri
2. Einar Gregersen, Klaksvík
3. Heðin Gregersen, Klaksvík
4. Sára T. Olsen, Tórshavn
5. Rúni Tindskarð Jacobsen, Tórshavn
6. Jóhannes Hansen, Haldórsvík
7. Sølvi Egilsson, Sandavágur
8. Pætur Magnussen, Tjørnuvík

**E-bólkur - U10 ár:**
1. Høgni Egilstoft Nielsen, Sandavágur
2. Alfred Olsen, Vestmanna
3. Sjúrður Olsen, Vestmanna
4. Dánjal K. Hansen, Tórshavn
5. Tóki Johannesen, Oyrarbakki
6. Jógvan Eli Debes, Oyri
7. Leivur í Buð Justinussen, Árnafjørður
8. Julian Gregersen, Klaksvík

TALV
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

NM í februar

Umframt serliga spenningin um, hvør vinnur FM-heitini, er somuleiðis sera stórur spenningur um, hvør vinnur sær luttøkurætt til Norðurlendskameistaraheitið í talvi sum verður í Danmark í februar mánað 2008. Nr. 1 og 2 í hvørjum aldursbólki luttaka. Kappingin er árliga hæddarpunktið hjá ungu telvarunum tí telvað verður eisini fyri møguleikanum - í ungum aldri - at sleppa uttanlands at telva ímóti javnaldrum úr hinum Norðurlondunum.

## Góðar royndir

Tilsvarandi kappingar eru í hinum Norðurlondunum og senda hesi, eins og Føroyar, 10 teirra bestu telvarar til NM. Føroyar hava luttikið í NM fyri ung í nógv ár, men hetta er 6. árið á rað, at Føroyar luttekur við fullari manning og sum kunnugt eydnaðist Helga Dam Ziska á fyrsta sinni - í Finlandi í februar mánað 2006 - at vinna Føroyum NM gull í aldursbólkinum 14-16 ár og í Íslandi fyrr í ár kom NM bronsa til høldar í U20 bólkinum.

## Spenningur í væntu

Undankappingar hava verið í Vestmanna og Sandavági og 8 teir stinnastu telvararnir í hvørjum aldursbólki luttaka í finaluni. Undankappingarnar bera boð um eina óvanliga spennandi FM finalu og NM-úttøkukapping. Burtursæð frá, at IM Helgi Dam Ziska og Høgni Egilstoft Nielsen sýnast favorittar í ávíkavíst elsta (U20) og yngsta (U10) bólkunum sýnist kappingin annars víðopin í hinum aldursbólkunum.

Finalan byrjar kl. 10.00. Sí annars www.faroechess.com

# Vit fara eftir gullinum

**Tað er nú greitt at tilsamans 89 svimjarar, úr øllum limalondum hjá Norðurlendska Svimjisambandinum, fara at luttaka á Norðurlendsku Junior-Meistarastevnuni 2007, ið verður hildin í Havn í ár**

SVIMJING
*Niels Petersen*
*niels@sosialurinfo*

Tilsamans 45 gentur og 44 dreingir eru klár at kappast í Føroyum um at gerast Norðurlendskur Junior Meistari, og málið hjá føroyska hópinum er at náa einum gull heiðursmerki, ið vit enn ikki hava megnað at vunnið í hesum høpi.

## Heiðursmerkir í væntu

Eitt silvurheiðursmerki er vunnið, fyri tveimum árum síðani í Reykjavík, og í Tampere í Finlandi, í fjør, fingu okkara íðkarar fýra bronsuheiðursmerkir. Tað var fyrstu ferð at Pál Joensen var við til eina slíka stórkapping, og her vann hann sítt fyrsta heiðursmerki.

Og við støðugu menningini hjá serliga Páli, er ikki ov nógv sagt, at vit kunnu vænta okkum okkurt stórt av okkara suverent besta svimjara.

## Føroyska luttøkan

Føroyski landsliðsvenjarin, danin Brian D. Marshall hevur valt at Føroyar skulu umboðast við fimm dreingjum og seks gentum, og eru tey úr Havnar Svimjifelag (HS) 6 íðkarar, Fuglafjarðar Svimjifelag (FS) 3 íðkarar og Suðuroyar Svimjifelag (Susvim) og Ægir hava ein íðkara hvør við í kappingini.

Freistin fyri endaligar tilmeldingar er leygardagin 24. november, og verður startlistin klárur, so skjótt sum til ber eftir tað.

## FAKTA

| | |
|---|---|
| Danmark: | 8 gentur og 8 dreingir |
| Svøríki: | 8 gentur og 8 dreingir |
| Noreg: | 6 gentur og 6 dreingir |
| Ísland: | 5 gentur og 5 dreingir |
| Finnland: | 8 gentur og 8 dreingir |
| Estland: | 4 gentur og 4 dreingir |
| Føroyar: | 6 gentur og 5 dreingir |

## FAKTA

**Dreingirnar ið umboða Føroyar eru:**

| | |
|---|---|
| Pál Joensen | Suðuroyar Svimjifelag |
| Kári J. á Høvdanum | Ægir |
| Pauli Ø. Mohr | Fuglafjarðar Svimjifelag |
| Dánjal Hestoy | Havnar Svimjifelag |
| David Simonsen | Fuglafjarðar Svimjifelag |

**Genturnar eru:**

| | |
|---|---|
| Guðrun Jakobsen | Havnar Svimjifelag |
| Bjørg Seloy | Havnar Svimjifelag |
| Dagmar M. Winther | Havnar Svimjifelag |
| Katarina Lamhauge | Havnar Svimjifelag |
| Hildur á Fløtti | Fuglafjarðar Svimjifelag |
| Helena G. Jacobsen | Havnar Svimjifelag |